## Eg meini tað



Sjúrður Gullbein

# Abbabeiggi

Tað ringir. Eg strevi meg undan dýnuni og taki hornið. Man hon hava átt nú? - *Halló! Ja, nú hevur hon átt.* Og alt gekk væl? - *Ja, og nú ert tú blivin abbabeiggi. Til lukku við tí!* Áhh... øhh... takk.

Hesin eftirburður kom so óvart á, at eg eri púra paff. Hornið verður lagt á, og eitt lítið klikk støkkur inn í oyrað á mær. Eitt sekund stendur verðin still, og eg siti bara og hoyri hetta ekkóa inni í mær. - *Tú ert blivin abbabeiggi!* Og so gongur tað upp fyri mær. Harragud, so eri eg blivin ræðuliga gamal! Eg felli opin afturá og smokki so spakuliga undir dýnuna aftur. Og so segði hon til lukku! Hevði hon av illum kondolerað!

Nei, upp við mær! Eg spíli bibburnar fram á gólv, lati meg í og fari stetlandi upp ígjøgnum trappurnar. Kenni longu aldurin tyngja, haldi eg, og tað er einki at siga til. Halgatrý, at fara í song sum ungur og spelkin maður, og so koma upp aftur sum ein skurvutur abbabeiggi, tað er ein ordans túrur, altso.

Komi upp í køkin, fái breiðafót niðurat og seti meg at rinda møðina. Og so hvørva burtur allar sútir, tá eg fái eitt deiligt morgunsmíl frá soninum, hann situr og etur havragreyt við góðan hug. Hann hyggur so smørliga upp á meg, og smílið veksur, til eg síggi allan havragreytin í munninum á honum. - *Hey, abbabeiggi*, sigur hann og grínur niður í skálina.

Nei, so fa... Eg brenni til arbeiðis. Skeikli meg upp í bussin, og so hurrandi av stað. Komin, setið eg meg við telduna og skal arbeiða, men einki vil bera til. Tað nýggja heitið vil ikki ganga frá mær, tað liggur og trokast inni á skrivstovuni, skavar á rútin og vil ikki geva mær frið.

Teldan stendur bara og gløðir upp á meg við sínum tóma eyga, biður meg skriva okkurt, men eg fái ikki. Í staðin kemur ein undarligur poetiskur hugur á meg, eg kenni meg andkveiktan og trýsti harðliga niður á knapparnar. Løtu seinni stendur úrslitið og starir at mær á skíggjanum.

Farið er veiggið,
nú dinglar á hálvum flaggi,
*abbabeiggi.*

Eg kasti frá mær og farið út at skeinkja mær kaffi.

Longu seinnapartin er lagið eitt sindur frægari, og eg kenni meg ikki heilt so gamlan. Í kvøld skal eg út at síggja tað lítla undrið, og útkomin, er horvin øll fáfongd og burtur øll kvøl. Tí píkasjey, sum eitt sovorðið barn er ótrúligt. So pinkulítið, og kortini so fullfíggjað. Og ommur og abbar og øll hini eru so býtt í hesum nýggja skapningi, at eg orni um hjartað og kenni eina deiliga gleði spæla inni í mær.

- *Og hetta er abbabeiggin?* Eg rakni líkasum við aftur, har eg standi, og heilsi uppá. Jú, hetta er hann, sigi eg og taki fastliga í hondina, sum er rætt ímóti mær. Vit smílast og ynskja hvør øðrum til lukku og fáa stundir til eitt lítið prát.

Og á heimveg, trokar sólin burtur skýbøklarnar og stavar niður yvir Havnar bý. Og eg seti bringuna fram úr mær og gangi so spelkin heim eftir gøtunum. Nøsin hevur hug at kvinka upp í ský, haldi eg.

Eg gamal? Hah, nei tú, eg eri sku abbabeiggi! Og tá eg standi á trappusteininum og hyggi at teimum spírandi trøunum, haldi eg, at lívið er deiligt. Og eg dragi djúpan av frískari várluft, smílist og lati hurðina aftur eftir mær.

**ARKTIS.** Havísurin í Arktis minkar so skjótt, at um ferðin verður tann sama næstu nógvu árini, er ísurin burtur áðrenn hendan øldin er runnin



**Kavbáturin USS Hawbill hevur funnið eitt hol í arktiska ísinum og er farin upp at fáa sær luft. Frá 1995 til 1999 hava granskarar kann ísin i Arktis við pensjóneraðum kavbátum hjá amerikumonnum**

# Arktiski ísurin verður burtur

*Eyðun Klakstein*

Tað fer at fáa umfatandi avleiðingar fyri lívið norðast á klótuni, um ísurin í Arktis hvørvur, og stóri spurningurin er, um hetta skyldast globalari upphiting ella tað eru onnur meira natúrlig viðurskifti, sum gera vart við seg, skriva granskararnir Lars Smedsrud og Tore Furevik í blaðnum, Cicerone, sum verður útgivið av norska Senter for klimaforskning.

Teir siga, at í løtuni minkar ísurin í Arktis so skjótt, at hann er horvin áðrenn øldin er úti, um gongdin heldur fram.

Amerikumenn eru eisini komnir til somu niðurstøðu, eftir at ein professari av University of Washington hevur gjørt kanningar í Arktis.

Blaðið hjá Dansk Polarcenter veit at siga, at Drew Rothrock, professari, er komin fram til, at ísurin í Arktis er vorðin er vorðin ein góðan metur tunnari í miðal.

**Global upphiting kanska syndarin**

Drew Rothrock hevur havt atgongd til loynilig skjøl hjá amerikanska flotanum, sum greiða frá kanningum, sum amerikumenn gjørdu av ísinum í Arktis frá 1958-76.

Og í 90'unum hava pensjóneraðir kavbátar gjørt kanningar í Arktis.

Við hesum skjølum og mátingum sum grundarlagi staðfestir Rothrock, at ísurin í Arktis nú er 1,8 metur tjúkkur í miðal afturímóti 3,1 metrum í 60'unum og 70'unum. Tað er tí 40% minni ísur í Arktis í dag, enn tað var fyri 20-40 árum síðani.

Professarin úr Washington vil ikki taka dagar ímilllum, um orsøkin til gongdina í arktiska ísinum er global upphiting ella ein natúrlig gongd.

- Tað kann væl vera, at tað er ein global upphiting, sum er syndarin, men tað kann eisini vera, at talan er um natúrligar 5-10 ára langar broytingar í veðurlagnum, sigur hann.

**Nýggjar kanningar**

Rothrock og hansara fólk siga, at tey fara at koma nærri einum svari, tá tey verða liðug við eina kanning av støðuni hjá arktiska ísinum seinastu 40 árini.

Í løtuni mangla upplýsingar frá amerikanska flotanum fyri tíðarskeiðið frá 1976 til okkara dagar, og bíðað verður nú eftir, at hesi skjøl verða leysgivin.

Leif Toudal frá Dansk Center for Telemåling sigur, at tey vita ikki, hvussu støðan er við ísinum í Grønlandi, men hann sigur, at gongdin seinastu 20 árini hevur verið tann, at ísurin er minkaður Eysturgrønlandi, men vaksin í Vesturgrønlandi.

Men kanningin hjá Rothrock og hansara fólki er komin óvart á nógv fólk, sum hava skil fyri arktiska ísinum, og serfrøðingar fylgja væl við gongdin á norðasta partinum á jørðini.

2 árin
**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjóri:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Har leið tað hungur og hall

**SEYÐUR.** Tá seyður kemur sær í óføri, verður farið eftir honum til tess at hjálpa stakkalinum aftur á gongdar leiðir. Sosialurin var við, tá eiðismenn tóku ær úr óføri



**Bert eitt varð burtur úr fylgi stygt, í oyðimørk uttan skjól**

*Orð og myndir:*
*Edvard Joensen*

Hóast níggju og níti liggja so trygg við grasgóð ból, so kemur tað meira enn so fyri, at tað eina skýtist av haga og kemur sær í óføri. Tá er bara eitt hjá røktingarmanninum at gera. Hann má kenna síni og leggja nógv fyri til tess at fáa tað eina, sum manglar í fylginum, aftur.

Nú hendan dagin vóru eiðismenn eftir eini ær, sum hevði staðið heldur leingi í eini torvu heiman fyri Heimastugjógv í Ritaskorunum. Í síni leitan eftir føði var hon lopin niður og slapp ikki uppaftur. Har stóð hetta ólukkudýrið so, sum tað stendur í sálminum, og leið hungur og hall. Vøllurin var mestsum allur avetin og traðkaður til eitt runudíki. Ein gjóta var at fara um longur heim í bergið, og har hevði hon funnið sær bólstað, soleiðis, at hon fekk lagt seg á ein lítlan pall, har einki hall var.

Ikki var hon løtt at síggja úr erva. Men ein forvitin ferðamaður, sum var farin fram við eggini við myndatóli, hevði lagt merki til hana og boðaði røktingarmonnunum frá. So varð farið avstað beinanvegin fyri at fáa hana upp, áðrenn fráboðaði landnyrðingurin kom. Tí illa er hugsandi, at hon hevði hildið leingi út har í andglettinum.

**Tað gamla er farið**

Nýggja tíðin er eisini komin til sigmenninar. Nú eru tað ikki tær tjúkku, tungu bjargalínurnar, sum berast skulu av fleiri monnum, sum nýttar verða, tá slíkt, sum at taka eina ær úr óføri, verður gjørt. Nú er tað nýmótans fjallaklintraraútgerð við klænari línu, sum isar í, tá á stendur. Reimum um miðu og lør og metalkrókum at hefta við. Um eggina verður lagdur ein tjúkkur slangustubbi, sum verjir minst líka væl sum bergstokkurin. Og so er alt nógv lættari at bera. Stungið niður í ein ryggsekk frá Skótabúðini, sum ein maður tekur á bakið og uttan ampa ber við sær.

Teir koma við bili oman á Møl. Røktingarmenninir Petur og Olivar saman við skótanum Høgna, sum eigur hesa nýmótans bjargalínuna, sum brúkast skal í dag.

Lítil hávi verður gjørdur burtur úr, áðrenn farið verður. Ein fer í termodrakt, eina annar í føroyska troyggju. Heldur kalt er, so húgvurnar verða ikki gloymdar. Og tá Høgni hevur pakkað ryggsekkin og blaðmaðurin hevur fingið myndatólið gjørt klárt, verður farið til gongu.

Gingið verður út undir hamrinum út á Tippi. Eitt sindur váttligt er í bønum, og heldur bratt er, so onkur ger eitt sovorðið kast av og á, Men einki reyvafall kortini. Farið verður upp stíggin, og so er tað bara ein løta, til vit eru komnir út móti Heimastugjógv, har ærin, vit fara eftir, stendur.

Kannað verður eftir, um hon man standa har enn, ella um hon er fairn út av í nátt. Hon hevur so flutt seg úr torvuni, sum vit síggja bein inn í, tá vit koma út á eggina heimanfyri. Nei, hon hevur lagt seg heiman fyri gjótuna, beint undir, har vit standa, og tað letur ikki til, at hon veit av okkum.

**Gjøgnum alt skursl og grót**

Tosað hevur verið um, meðan gingið varð, hvussu best var at gera. Avrátt var, at Olivar skuldi fara einsamallur niður fyrst. Skemtandi helt hann fyri, at tað var helst best, at tann lættasti varð sleptur útav.

Tað var skjótt, at hann hevði latið seg í »selatoyið« og krøkt í. Petur fór út á upsina at ansa línuni, meðan Høgni sat við.

Hendan nýggja síðingin er ikki sum fyrr var. Her verðut gjørt fast í erva, øll lína blakað útav, og so lesir maðurin seg niður við spennum, hann hevur á línuni. Hann klárar alt einsamallur, um tað skal vera.

Men eingi óráð skuldu takast fyri kortini, so varisliga varð farið fram. upsin ruddað fyri leyst grót, og Petur hevði vakið eygað við, hvussu línan lá, hvar ærin var, og hvussu Olivar best skuldi flyta seg.

Men tað var nú eingin trupulleiki kortini. Ærin var ógvuliga góð at samstarva við. Fyrsta maðurin var komin niður, fór hon av sær sjálvum niðan gjøgnum gjótuna, har hon ikki fekk farið so skjótt, fyri smágrótinum, sum rutt var oman so við og við. Olivar tók hana beinanvegin, og so var bara at seta klønu línuna, Petur hevði við til tað sama, á hana.

Ája, hon varð leidd heilt upp at hamrinum. Gjørt varð á han og so varð hon drigin upp, til tað fekst i nakkan á henni, og so var sloppið.

At fáa mannin upp aftur var als eingin trupulleiki, og tað var bara ein lítil løta, so var alt avriggað aftur. Línurnar gjørdar upp. Nýggja bjargalínan pakkað aftur í ryggsekkin. Petur hevði ta klønu um herðarnar, og ærin fór so væl nøgd sjaggandi heim gjøgnum slætta hagan.

Hon var ikki væl fyri, stakkalin. Hevði helst staðið har í nógvar dagar og var heldur kløn og eitt lítið sindur skinklut.

Men í tað sum treyst ikki var kortini. Hon helt beina leið heim á Mølina, har hon kom saman við øðrum seyði, sum helt seg fram at har, tær plaga at fáa hoyggj.

Men ikki var liðugt so kortini. Tí úti á Torvanesi stóðu tvær ær fastar í fjøru. Tær vóru farnar tvassandi niður at fáa sær tara og sluppu nú ikki uppaftur. Ov mikið av runi var í sjónum til, at tær sluppu heim undir Skarðhamar aftur. So ikki gjørdist annað enn at fara niður á helluna eftir teimum og hiva tær upp fyri hamaran.

Hesaferð fóru tríggir mans niður, og eisini hetta gekk upp á stás. Tær vórðu sleptar niðan í bøin og fóru so hugagóðar niðan í Kollsbyrgi at eta víðari. Hugsaðu ikki annað enn at fáa sær upp í vombina.

»Men eingin av teimum bjargaðu veit, hvør torfør var hendan ferð.«

Hóast ikki kann sammetast við tann hirðan, sum sungið verður um í sálminum um tey níggju og níti, sum lógu so trygt, er ein ávís líkheit kortini. Sanniliga leggur føroyski hirðin væl fyri, tá hann lesir seg niður av upsini at taka eina ær, sum er komin sær í óføri. Og veruliga kundi tað verið soleiðis, at ...»lívið var burtur, um fótur var gleið.«

Men eisini her varð hann styðjaður so, hann snávaði ei.



**So eru tey komin uppaftur. Petur hevur fingið hendur á ærini, meðan Høgni hjálpir Olivari at loysa seg úr**